


Bjørn Kunoy, Kaj Leo Johannesen, Johan Dahl, Martin Heinesen og Finn Mørk. Mynd Jens K Vang

# UG í landgrunni – Føroyar størri og ríkari

**Jan Müller**

20.03.2014 - 10:44

Oljan.fo

Sjáldan hevur hýrurin verið so góður í Tinganesi sum henda regnfría marsmorgun í 2014. Ongar politiskar ósemjur og ónøgd at hóma. Alt í sátt og semju – og andlitsbrosini bera boð um góðu søguna, sum varð almannakunnfjørd í spildurnýggja fjølmiðlarúminum í Tinganesi – ið liggur bara eina trappu frá skrivstovuni hjá sjálvum løgmanni.

Og orsøkin til róman og gleðina: Føroyar og okkara samráðingar- og embætisfólk hava fingið eitt greitt UG í lærugreinini landgrunni frá mikla próvdómaranum, Landsgrunnsnevnd ST.

Við Bjørn Kunoy, Finn Mørk, Martin Heinesen og øðrum dugnaligum fakfólkum á odda og við øllum tí politiska apparatinum aftanfyri seg, kann føroyska tjóðin frá Palleba til løgmann vera væl nøgd og fegin.

Føroyar eru við semjuni um landgrunnsmark fyri norðan vornar størri og uttan iva eisini ríkari, hvat serstakliga komandi ættarlið vónandi fara at merkja.

Portalurin og oljan.fo vóru á tíðindafundi í morgun og fara fleiri áhugaaverdar greinar at síggjast á portalunum komandi dagarnar.